tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-05 |
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Krsistin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Kristina Roest og Annika Pearce, ið møtir fyri Súsonnu Bertholdsen.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2019 | 2 |
| 2 | Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan fyri Tvøroyrar Kommunu | 2 |
| 3 | Eykajáttan til stuðul til ítrótt várið 2019 | 4 |
| 4 | Løgur á skúlaøkinum - eykajáttan | 5 |
| 5 | Leiðari til kunningarstovuna | 6 |
| 6 | Búmerki til mentanarnáttina | 7 |
| 7 | Umsókn um at brúka hølini í ovaru hæddini í Posta-bygninginum - Eftirskúlanevndin | 8 |
| 8 | Eldraøkið í Suðuroynni/Uppskot til Løgtingslóg um royndarskipan fyri Suðuroynna til hoyringar | 9 |
| 9 | Aðalfundur hjá IRF 2019 | 10 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-05 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-Ø00-1-19**

## 1. Skattainntøkur 2019

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 5. april 2019, pkt. 1:**
Nevndin er kunnað um skattatølini higartil í ár.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri mars mánaða og fyri árið sum heild.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2018-2019.xlsx
- Skattur 2019.pdf

**00.15.00-A21-1-09**

## 2. Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan fyri Tvøroyrar Kommunu

### Samandráttur

Í uppskotinum til broytingar í starvsfólkaskipanini fyri Tvøroyrar Kommunu eru broytingar í pkt. 2 viðv. setan av starvsfólki, pkt. 5 viðv. sjúkrafráveru, pkt. 6 viðv. aðrari fráveru, pkt. 7 viðv. fráfaringaraldri og pkt. 16 viðv. sosialum miðlum.

### Málsfrágreiðing

**Býráðið, 3. december 2018, pkt. 19:**
1. viðger av broyting í starvsfólkaskipanini:

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-05 |
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Broytingar einmælt samtyktar við 1. viðgerð.

**Býráðið, 13. marts 2019, pkt. 2:**
2. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipanini:

Kristina Roest mælir til at beina málið í fíggjarnevndina. 4 atkvøður fyri, 3 atkvøður ímóti. Kristina Roest, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt.

**Fíggjarnevndin, 5. april 2019, pkt. 3:**
**Setanarbólkur**
Kristin Michelsen tekur undir við tilmælinum frá kommunustjóranum viðv. setanarbólki.
Kristina Roest og Bjarni Hammer taka ikki undir við broytingaruppskotinum viðv. setanarbólki.

**5. Sjúkrafrávera og 6. Onnur frávera**
Nevndin tekur undir við broytingaruppskotinum.

**7. Fráfaringaraldur**
Kristin Michelsen og Bjarni Hammer tekur undir við tilmælinum frá kommunustjóranum viðv. fráfaringaraldri, tó skal býráðið kunnast bæði um hvør ið fer úr starvi og hvør ið hevur søkt um at halda fram í starvi aftaná 67 ár.
Kristina Roest tekur ikki undir við broytingaruppskotinum viðv. fráferðingaraldri.

**16. Sosialir miðlar**
Nevndin tekur undir við broytingaruppskotinum.

Málið verður beint í býráðið.

**Avgerð**

**2. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipan:**

**Setanarbólkur**
Atkvøðugreiðsla um broytingina: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøddu ímóti. Tilmælið fallið.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-05 |
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**5. Sjúkrafrávera og 6. Onnur frávera**
Atkvøðugreiðsla um tilmælið: Broytingin einmælt samtykt.

**7. Fráfaringaraldur**
Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøddu ímóti. Tilmælið fallið.

**16. Sosialir miðlar**
Atkvøðugreiðsla um tilmælið: Einmælta samtykt.

## Skjøl

- dagførd og góðkend starvsfólkaskipan 10.09.2018
- Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan apríl 2019

**00.30.18-Ø00-1-19**

## 3. Eykajáttan til stuðul til ítrótt várið 2019

## Samandráttur

Í samband við, at býráðið hevur játtað kr. 480.000,- í stuðli til TB í ár, ynskir nevndin, at kr. 180.000,- av hesum verða fíggjaðar við eykajáttan. Fíggjarleiðarin mælir til, at eykajáttanin verður fíggjar av gjaldførinum.

## Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 1. april 2019, pkt. 16:**
Nevndin mælir til at veita eykajáttan til stuðul til ítrótt áljóðandi kr. 180.000,-, ið verður fíggjað av gjaldførinum.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



**Fíggjarnevndin, 5. april 2019, pkt. 7:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá mentanarnevndini.

### Fígging

Eykajáttan áljóðandi kr. 180.000,- til stuðul til ítrótt.

### Avgerð

1. viðgerð av eykajáttan:

Tilmælið frá mentanarnevndini einmælt samtykt.

**00.30.18-S00-1-19**

## 4. Løgur á skúlaøkinum - eykajáttan

### Málsfrágreiðing

Forkvinnan ynskir at umrøða møguleikan at flyta løgujáttanina til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar.

**Mentanarnevndin, 4. marts 2019, pkt. 10:**
Nevndin mælir til, at báðar lærarastovnurnar verða nútímansgjørdar, tó við atliti til, at nýggjur skúli skal byggjast.

Nevndin mælir til at flyta kr. 600.000,- frá løgujáttanini til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar.

**Fíggjarnevndin, 7. marts 2019, pkt. 6:**
Nevndin mælir til at útseta málið til støða er tikin til staðseting av skúlanum.

**Býráðið, 13. marts 2019, pkt. 6:**
1. viðgerð av eykajáttan á fólkaskúlaøkinum:

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-05 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Atkvøðugreiðsla um at flyta kr. 600.000,- frá løgujáttanini til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar: Eykajáttan einmælt samtykt við 1. viðgerð.

### Fígging

Talan er um útreiðsluneutrala eykajáttan - at flyta kr. 600.000,- frá løgujáttanini til gólvið í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar.

### Avgerð

2. viðgerð av eykajáttan:

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá mentanarnevndini um at flyta løgujáttanina á 600.000 kr. frá gólvinum í skúlagarðinum í Trongisvági til løgujáttanina til lærarastovurnar:

Anita Vibergsdóttir, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøddu fyri, ongin atkvøða ímóti. Kristin Michelsen og Alvi Mortensen atkvøddu ikki. Eykajáttan samtykt.

Kristin Michelsen ynskir viðmerkt, at hann hevur onki ímóti at lærarastovurnar verða uppdateraðar, men hetta skuldi verið gjørt við einari eykajáttan til lærarastovurnar, so at gólvið í skúlagarðinum eisini varð gjørt, sum eitt samt býráð samtykti í fíggjarlógini fyri 2019 skuldi gerast.

### Skjøl

- Kostnaðarmeting TILMÆLI innbúgv Siri 12.10.2018.pdf

**81.02.00-G01-1-19**

## 5. Leiðari til kunningarstovuna

### Málsfrágreiðing

Verandi kunningarleiðari, Póla Strøm, heldur ikki áfram í tí funktiónini aftaná 13. juni 2019. Tískil er neyðugt at søkja eftir nýggjum kunningarleiðara.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-05 |
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Støða skal takast til innihald í starvslýsing.

**Vinnu- og havnanevnd, 11. marts 2019, pkt. 4:**
Umsitingin ger uppskot til eina lýsing, í samráð við Commit, um tað er ein partur av teirra verkætlan.

**Vinnu- og havnanevnd, 3. april 2019, pkt. 5:**
Nevndin tekur undir við at lata Commit taka sær av setanini av kunningarleiðara.
Málið hevur skund, og tískilt verður mælt til at fara til verkar beinanvegin.

**Fíggjarnevndin, 5. april 2019, pkt. 9:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnarnevndini, men minnir á, at kommunustjórin skal vera við í setanarbólkinum.

### Avgerð

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá fíggarnevndini um at brúka CommIT og at kommunustjórin skal vera við í setanarbólkinum:Einmælt samtykt.

### Skjøl

- Teldupostur frá Theresu Turiðardóttir
- seta kunningarleiðara á Tvøroyri_0.pdf
- Teldupostur til býráðslimirnar

**00.13.10-G01-1-19**

## 6. Búmerki til mentanarnáttina

### Samandráttur

Forkvinnan ynskir at umrøða uppskot til búmerki til mentanarnáttina.

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-05 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 1. april 2019, pkt. 14:**
Umsitingin ger eitt uppskot við M frá tí fremsta uppskotinum og sóljunum frá tí aftasta uppskotinum. Uppskotini verða sett á myndir.

### Avgerð

Einmælt samtykt at brúka niðasta uppskotið á seinnu framløguni.

### Skjøl

- Logo.pdf
- Logos2.pdf

**82.16.00-G01-1-19**

## 7. Umsókn um at brúka hølini í ovaru hæddini í Posta-bygninginum - Eftirskúlanevndin

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 8. april 2019, pkt. 2:**
Bjarni Hammer greiðir frá, at teimum tørvar hølir og tað er týdningarmikið, at skúlin hevur sítt egna. Tískil søkir Eftirskúlanevndin um at lána/leiga ovaru hæddina á posthúsbygninginum til endamálið eitt avmarkað tíðarskeið, eitt ár fyri fyrst.

Anita Vibergsdóttir tekur støðu til málið á býráðsfundinum.

Súsanna Bertholdsen mælir til at lata eftirskúlanevndina gera brúk av hølunum, og at gjaldast skal ikki leiga fyri tað fyrsta árið. Hetta verður ein partur av íkastinum hjá Tværyorar kommunu. Ein leigusáttmáli verður gjørdur fyri eitt ár.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2019-05 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Borgarstjórin mælir til at bíða við at taka avgerð í málinum til býráðið fær at vita frá eftirskúlanevndini, hvat tað fer at kosta at reka eftirskúlan í ár, umframt at rakstrarjáttanin fyri eftirskúlan og hølir til bústaðir til næmingar eru góðkend av Mentamálaráðnum.

Anita Vibergsdóttir viðmerkir, at hon heldur tað vera ov vánaligt, at bert tveir limir í nevndini fyri eftriskúlan møttu á fundi við býráðið.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá borgarstjóranum: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøddu ímóti. Tilmælið fallið við 3 atkvøðum fyri og fýra atkvøðum ímóti.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá forkvinnuni í mentanarnevndini um at lata eftirskúlanevndina gera brúk av hølunum, og at gjaldast skal ikki leiga fyri tað fyrsta árið. Hetta verður ein partur av íkastinum hjá Tvøryorar kommunu. Ein leigusáttmáli verður gjørdur fyri eitt ár: Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøddu fyri, ongin atkvøða ímóti, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ikki. Tilmælið samtykt við fýra atkvøðum fyri og ongari ímóti.

### Skjøl

- Skriv frá Eftirskúlanevndini

**00.17.15-A00-2-19**

## 8. Eldraøkið í Suðuroynni/Uppskot til Løgtingslóg um royndarskipan fyri Suðuroynna til hoyringar

### Avgerð

Borgarstjórin mælir til at fáa málið betri lýst viðv. kostnaði av nevndu tænastunum til persónar frá 18 til 67 ár higartil í ár.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-05 |
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá borgarstjóranum: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøða fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøða ímóti. Tilmælið fallið.

Atkvøðugreiðsla um at taka undir við uppskoti til løgtingslóg um royndarverkætlan í Suðuroynni: Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Annika Pearce og Kristina Roest atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ikki Samtykt at taka undir við uppskotinum við fýra atkvøðum fyri.

### Skjøl

- Uppskot til ll um royndarskipan fyri Suðuroy.docx

**00.17.15-A00-1-19**

## 9. Aðalfundur hjá IRF 2019

### Samandráttur

Tilfarið í hesum málinum er sent býráðslimunum umvegis teldupost.

### Avgerð

Kristina Roest ynskir at vita, um býráðið tekur undir við tí tilfari, ið er sent til kommunurnar í samband við aðalfundin hjá IRF.

Einmælt samtykt at taka undir við tí tilfari, ið er sent til kommunurnar í samband við aðalfundin hjá IRF.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2019-05 |
| Fundardagur | 11. april 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin** **Fundur lokin**

Kristin Michelsen:____________________

Bjarni Hammer:____________________

Anita Vibergsdóttir:____________________

Bogi Johannesen:____________________

Alvi Mortensen:____________________

Kristina Roest:____________________

Annika Pearce:____________________



____________________Formansváttan